Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Føroyskt og fremmant í Smiðjuni

**Havn:** Henda komandi mánaðin verða fleiri áhugaverdar framsýningar í Lítluvík.

Listin yvir komandi framsýningar er klárur, og verða hesar framsýningarnar fram til 3. mai:

Bent Erdland
frá 25. - 29. mars
Bruno Mikael Eysturstein
frá 1. - 5. apríl
Astrid Macdonald
frá 8. - 12. apríl
Magni Dalsgaard, Vigdis Sigmundardóttir og Lena Maria Ellingsgaard
frá 15. - 19. apríl
Helgi Midjord
frá 22. - 26. apríl, og
Bengt Calmeyer
frá 29. apríl - 3. mai.

So her skuldi verið nakað til øll at farið og hugt eftir.

# 17 lond hittast á føroyskari grund

**Seinast í mai mánaði verður eitt spennandi altjóða tiltak á Læraraskúlanum, har fólk úr øllum heimspørtum hittast til ein altjóða mentanardag**

ALTJÓÐA SAMBAND
*Snorri Brend*

**Havn:** Tey, ið hava áhuga fyri at læra meiri um útlendska mentan og teirra mat, eiga at seta sær leygdagin 28. mai av til hetta.

Tá verður nevniliga skipað fyri einum serstøkum altjóða mentanartiltaki har umboð fyri íalt 17 ymisk lond fara at luttaka við øllum tí, sum teirra land hevur at bjóða.

Á skránni verða bæði framsýningar, tónleikur, matur, søgur og uttan iva nógvur látur, tí væl liggur fyri hjá útlendingum at skera í látur bert av einum einstøkum orði.

Tað eru Olga Hentze og Jórun Simonsen, ið hava tikið stig til henda altjóða dagin fyri føroyingar og útlendingar.

- Endamálið við hesum degnum er at fáa í lag góð viðurskifti og betri kunnan um og millum londini, siga tær báðar, Olga og Jórun.



*Teirra tjóðbúni líkist ikki okkara. Seinni í vár verður høvi at síggja fólk í tjóðbúnum úr íalt 17 londum, tá tvær virkisfúsar kvinnur skipa fyri einum altjóða mentanardegi á føroyskari grund*

### Søgur og matur

Tær báðar, Olga og Jórun hava arbeitt við hesum tiltakinum í eina tíð, og hava, sum er fingið fatur á fólkum úr íalt 17 ymiskum londum.

Heis fólkini koma úr fýra londum í Latínamerika, fimm londum úr Afrika, trimum londum úr Asia, úr Russlandi, Amerika, Canada og Australia.

Tær hava somuleiðis fingið samband við ein professjonellan trummusláara úr afrikanska landinum Gamba og sum býr í Danmark. Hesin fer at verða partur av tí afrikansku skránni á degnum.

Ein framsýning verður eisini á degnum, har ymiskt handverk úr Afrika og Latínamerika verður at síggja, eins og fólkini úr øllum hesum 17 londunum fara at vísa fram tjóðarbúnar sínar.

Ætlanin er somuleiðis at vísa luttakarunum á føroyska mentan, og tí verður miðað eftir eisini at hava føroyskan dans á skránni. So her ber tí at siga, at skráin fyri tiltakið sær sera spennandi út.

Alt kostar sjálvandi pening, og tí eru tær báðar í løtuni í ferð við at útvega sær fígging til hetta tiltakið.

### Altjóða mentan

Í samband við tíðindini um útlendingar í Føroyum kom fram eitt tal, sum vísti at tað helst eru nærri 1000 útlendingar her á landi.

Hvønn felagsskap hesi 1000 úr mongum ymiskum londum hava við hvønn annan er ilt at meta um. Men nú verður so í øllum førum gjørd ein roynd at sjóða hesi fólkini saman í ein dag.

Hvat so hesin dagurin so víðari kann føra til, tað fer tíðin at vísa. Men Olga og Jórun dylja ikki fyri at tær hava eisini aðrar ætlanir í hyggju.

- Gongur sum ætlað, so verður eisini savnaður pengingur inn til ein felagsskap fyri altjóða mentan, siga tær báðar.

Tær hugsa sær her ein felagsskap fyri fremmand í Føroyum, har tey kunnu fáa innføring í ta føroysku mentanina, eins væl og ein her kann fáa í lag vinarbond millum fólk og lond.

# Tarira og Sunleif á norðurlandaferð

Í døgunum 19. til 26. mars fer kórið Tarira at ferðast kring norðurlond. Kórið fer saman við kórleiðara sínum, Sunleif Rasmussen, at hava konsertir í Göteborg, Stockholm og Mariehamn (Áland). Seinasta framførsla á norðurlandaferðini verður Langafríggjadag í Ny Carlsberg Glyptotek í Keypmannahavn.

Hóast Tarira er lutfalsliga nýtt, hevur kórið longu gjørt vart við seg við fleiri framførslum á sera høgum støði, m.a. í sambandi við Listastevnuna.

Kórið hevur valt at miðsavna seg um ávikavíst tónleik úr endurburðartíðini (renesansuni) og samtíðartónleik. Millum tær størru avbjóðingarnar hjá kórinum kann nevnast renesansuverkið "Lamentations of Jeremiah" hjá Robert White, sum varð framført á Føroyaferð í fjør.



*Tarira fer í kvøld at hava fyrstu konsertina á eini konsertferð til Norðurlond nú um páskirnar*

### Blandaður sangur

Til norðurlandaferðina er skráin samansett av norðurlendskum modernaðum tónleiki við serligum denti á føroyskt tilfar. Føroyingar fáa eisini høvið at uppliva kórið, sum, tá tað kemur heimaftur, fer at hava konsert í Norðurlandahúsinum.

Kórið fer m.a. at syngja "Pater Noster" hjá Bjarna Restorff frá 2001 og "Herrens Bön" frá 1998 hjá álendska tónaskaldinum Kjell Frisk. Harumframt verður "En ny himmel och en ny jord" hjá Sven David Sandstrøm framført. Eitt sera dramatiskt verk, har tað veruliga er eydnast tónaskaldinum at raka tann ekstatiska tónan í Johannesar Opinberingini um hitt nýggja Jerusalem, ið kemur av himni sum ein brúður, ið er skrýdd fyri brúðgómi sínum.

Meðan tekstirnir í nevndu verkum eru bíbilskir, tykjast teir flestu av hinum tekstunum ekstistentielt grundaðir, har tilveran onkursvegna verður skoðað sum relieff deyðans. Hetta er m.a. galdandi í teirri konsentreraðu yrkingini hjá Róa Patursson "Skærur vindur", sum Sunleif hevur tulkað í eini leitandi, andsættaðari komposition. Fimm núlivandi føroysk tónaskøld eru umboðað á skránni og herímillum er eisini kórleiðarin.

### Gitin kórleiðari

Sunleif Rasmussen er sum kunnugt tónaskald, hann vann tónleikaprísin hjá norðurlandaráðnum fyri ta fyrstu føroysku symfonina: Symfoni nr. 1 "Oceanic Days", ið júst er útgivin á fløgu.

Hóast hann kanska er mest kendur sum tónaskald, er hann als ikki óroyndur kórleiðari. Líka síðani 80´ini hevur hann bæði sungið við í og stjórnað ymsum kórum, m.a. var hann við í Cantus Borealis, eins og hann stjórnaði útisetakórunum Mpiri og Húsakórinum eitt tíðarskeið.

Føroyskt samtíðartónasmíð er væl umboðað í skránni. Og hóast yrkjarirnir á skránni sum heild eru nakað eldri, er góðskustøðið høgt í yrkingunum hjá m.a. hjá Christiani Matras, Williami Heinesen, Karsteni Hoydal, Steinbirni B. Jacobsen, og Róa Paturssson.

### Fýra konsertir

Konsertirnar hjá kórinum verða hesar: Í kvøld, 19/3 Göteborg. Hagakyrkan. Haga Kyrkoplan kl. 19.30; 20/3 Stockholm: Mariakyrkan. Skogåstorget 10, S-142 21 Skogås kl. 18; 22/3 Mariehamn: Jomalakyrka, Jomala kl. 19, og 25/3 København: Ny Carlsberg Glyptotek, Dantes Plads 7 kl. 14.

Kamarkórið Tarira telur á ferðini 19 royndar kórsangarar. Sopran: Joanna Johansen, Berghild Poulsen, Malan Hansen, og Urd Johannesen. Alt: Píl Reinert, Gunnvør Poulsen, Durita Eliasen, Elspa Samuelsen og Kinna Poulsen. Tenor: Peter Hentze Niclasen, Hans Debes, Pauli Hansen, Allan Dalsgarð og Herluf Lützen. Bass: Høgni Debes, Eyðun Eliasen, Andrias Petersen, Niels Winther og Fróði Sandoy.